TEKNIKARI

Til styrkjan av prosjekt- og viðlikahaldsdeild okkara, verður søkt eftir einum teknikara.

Starvið: Starvið fevnir um planlegging og útinnan av prosjektum og alt viðlikahald í samstarvi við verandi mannina á deildini. Talan er eisini um ráðgevaraarbeiði, m.a. á servicuøkum, gomlum og tangabilum. Arbeiðsøkið er kring allar Føroyar, men arbeiðsmiðdeplin er Tórshavn.

Útbúgving: Tú skalt helst vera handverkari. Hevur tú harumfrámt teknifrøðiligu útbúgving innan maskin- og eltekni, gevur hetta fyrimun. Eisini er tað ein fyrimun, tú hevur ein góðan samstarvsevni, og at tú er hugaður at veita góða tænastu.

Vit bjóða ter: Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við góðum moguleikum fyri personligari og fakligari menning. Dátarbeiðsumstøður og tryggur starvsvirðurskifti. Løn eftir avtalu í samsvari við útbúgving og royndir. Eftirlønarordningin.

Umsókn: Skriviligu umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 14.08.2002. Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Heina í Búðleiðbeina á telefon nr. 34 74 00. Allar umsóknir verða viðgjordar í trúnaði.

Shell

P/F Føroya Shell
Viðarnes • Postbox 188 • 110 Tórshavn
Tel: 34 74 00 • Fax: 34 74 90 • e-mail: shell@shell.fo
www.shell.fo

Afturlatingarútsøla

÷ 20%
÷ 30%
÷ 50%

MINA WILHELM
N. Finsenagøta 31 • Tel. 31 16 73

Móttøka

Í samband við at Sofus Poulsen, umboðsmaður Føroya í Aberdeen, fer frá 1. juli eftir trúgva tænastu, verður móttøka í móttøkuhølum løgmans í Skansapakkhúsinum í Tinganesi mikudagin 26. juni 2002 kl 15.00-17.00

Løgmanskrivstovan

Skrásetingur Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi frábodan:

Skrásetingarnr. P/F 2941, P/F TF Holdings, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini:
Johannus Gunnar Egholm Hansen, Bredgade 49, DK-1260 København K (formaður), Gregor David Dalrymple, 13, Rue de la Greve, L-8020 Strassen og Kaj Andreasen Ellemosevej 65, DK-3200 Helsinge.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Kaj Andreasen, Ellemosevej 65, DK-3200 Helsinge.

Felagið er tann 22.05.2002, fanið í likvidation við Johannus Gunnar Egholm Hansen, advokatur, Bredgade 49, DK-1260 København K sum likvidator.

Skráseting Føroya tann 21. juni. 2002.

Kristin Balle

Skrivstovufólk

til Føroya Handilsskúla á Kambsdali

Føroya Handilsskúli á Kambsdali søkir eftir skrivstovufólki hálva tíð at byrja 1. august 2002.

Starvið umfatar:
Starvið umfatar alt vanligt skrivstovuarbeiði í samband við skúlan.

Førleikakrøv
Fólk við hollari skrivstovuútbúgving og royndum í bókhaldsarbeiði hava fyrimun. í starvinum hevur tú samband við nógv fólk, bæði innan- og uttanhýsis, og mást tú tí vera opin og virkin.

Setanartreytir
Sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknarfreist
Umsóknin skal verða Handilsskúlanum á Kambsdali í hendi í seinasta lagi mikudagin 9. juli 2002. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til deildarstjóran á tel. 444 900.

FØROYA HANDILSSKÚLI
Kambsdalur · 530 Fuglafjørður
Tel. 444 900 · Fax 444 901
Teldupost adr: fh@kambsdal.olivant.fo

Avloysarastarv

Søkt verður eftir fólki til fulltíðarstarv á Dómaraskrivstovuni til setan skjótast gjørligt. Setanartíðin er 6 mánaðir.

Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:
- Vanligt skrivstovuarbeiði
- Skráseting á teldu
- Telefonavgreiðsla

Førleikakrøv:
Til starvið krevst:
- Skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving
- Góð evni at samskifta á føroyskum og donskum máli
- Teldufarleiki á brúkarastøði
- Góð samstarvsevni

Setanartreytir:
Løn- og setanartreytir eru sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet. Setanarøkið fevnir um allar deildir á Dómaraskrivstovuni.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Kathrinu Magnussen, skrivstovuleiðara, tlf. 311008.

Umsóknir:
Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli skulu verða Dómaraskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 5. juli 2002.

Sorinskrivarin í Føroyum,
tann 21. juni 2002
Jørgen B. Petersen, adm.

Skrásetingur Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi frábodan:

Skrásetingarnr. Sp/f 3377

Navn:
Sp/f 10. juni 2002

Adressa: c/o Kongshavnar Tríðarfelag, Box 180, 600 Saltangará.

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 17.06.2002
Viðtøkudato: 17.06.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Sp/f Kongshavnar Tríðarfelag, 600 Saltangará (Sp/f 1381).
Stjórn: Bjarti Mohr, V. U. Hammershaimbsgøta 36, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Grannskoðaraviðkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskapará: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskapará: 17.06.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 21. juni 2002

Kristin Balle

Skrásetingur Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi frábodan:

Skrásetingarnr. Sp/f 2228, Sp/f Nordic Frost, 100 Tórshavn.

Navn: Sp/f Nordic Frost
Adressa: 100 Tórshavn
Felagið er strikað eftir samanlegging við skrásetingarnr. Sp/f 2124, Sp/f Nordic Bulk.

Skráseting Føroya tann 21. juni 2002

Kristin Balle

MB Svananes FD 160 14,68 tons

Deksbátur við fiskiloyvi til sølu. Bygdur í 1968 úr eik og dupultbendaður.

Maskina: Volvo Penta 6 cyl. 270 HK, fer: 9-10 míl, 2 x 24 w-el, øll nautisk útgerð og sentralhiti.

8 el-Vágasnellur, línuspæl v/ íslandsrullu. Klárur til snellu- og línufiskiskap.

Tlf. 213456

Útbjóðing

í samband við bygging av nýggjum barnagarði og vaggustovu í Sandavági verður:

TIMBUR- og SNIKKARAARBEIÐIÐ

hervið boðið út í almenna lisitatión.

útbjóðingartilfarið fæst frá Kommunuskrivstovuni í Sandavági frá tysdegnum hin 25. juni kl. 13.00 móti at flyta kr. 5.000,- á konto í Føroya Banka nr. 6460 - 2200556 ella Føroya Sparikassa nr. 9181 - 1850018.

Tilboð í afturlatnum brævbjálva merktur »Barnagarður og vaggustova: Timbur- og snikkaraarbeiði« skulu vera kommunuskrivstovuni í Sandavági í hendi seinast mikudagin hin 17. juli 2002 kl. 15.00.

Lisitatiónin verður sama dag kl. 1530, har teir bjóðandi hava møguleika fyri at verða hjástaddir.

SANDAVÁGS KOMMUNA
Tlf. 332470 · Fax 333470
t-postur:
sandavagur@sandavagur.fo

Loppumarknaður

Kyndil skipar fyri loppumarknaði í miðbynum leygardagin 6. juli. Tikið verður ímóti lutum (ikki klæðir) hósdagin 4. juli frá kl. 17 til kl. 19 í Kyndilshølunum í Gundadalshøllini.

Tit eru vælkomin at ringja á tel. 312234 Erla ella tel. 317022 Katrin, um tit hava stórri ting, sum skulu avheintast.

Kyndil

Sethúsaklædningur

Plastik er á goymslu

Slitsterkur & viðlíkahaldsfríur

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

Føroya Sjómansskúli
Maritime College

Skeiðdeildin

Skeiðdeildin á Føroya Sjómansskúla skipar fyri eftirútbúgving av sjómonnum

Skeiðætlanin fyri 2. hálvár 2002

ARPA			
Byrjar	26. august	4-5 dagar	kr. 7.000
Byrjar	7. oktober	4-5 dagar	kr. 7.000
GOC (generelt certifikat sum radiooperatørur)			
Byrjar	23. september	15 dagar	kr. 10.900
GMDSS-endurnýggjan			
Byrjar	16. september	5 dagar	kr. 5.900
Byrjar	4. november	5 dagar	kr. 5.900
LRC (avmarkað radioskeið)			
Byrjar	21. oktober	8 dagar	kr. 6.500
Olju-, gass- og kem. 1. partur (Tanker Safety)			
Byrjar	9. september	5 dagar	kr. 5.200
Flutningur av vandamiðlum evnum			
Byrjar	2. september	4 dagar	kr. 4.200
Arbeiðsumhvørvi (§16)			
Byrjar	11. november	3 dagar	kr. 4.200
Tilbúgving §§ 4, 7 og 8 (Nutec)			
Byrjar	23. september	3 dagar	kr. 5.500

Øll skeiðini eru dagskeið, og undirvísingin fer fram á skúlanum.
Skúlin hevur møguleika at skipa fyri øðrum skeiðum, umframt nevndu skeið til aðrar tíðir. Meiri fæst at vita við at seta seg í samband við skúlan.

Tilmelding á tel 35 75 00 / 35 75 16 ella sg@farnav.fo

Útbúgvingarnar á Føroya Sjómansskúla eru góðkendar av Føroya Landsstýri, safartsstyrelsen og IMO

Nóatún 2
Postboks 104
FO-110 Tórshavn
Føroyar
Tel +298 35 75 00 / 35 75 16
Fax +298 35 75 02
sg@farnav.fo
www.farnav.fo

Salongin

er afturlatin frá 26/6 - 21/7.

Eskild Nordbúð

Teknmáls-tulkatænastan

er stongd vegna summarfrí frá 1. juli til 7. august.

Um brúk er fyri neyðtulking kann ringjast til tlf. 319012.